## Nýtt renni- og gongufelag eitur Hvistan

**Í Suðuroynni hevur nýtt renni og gongufelag sæð dagsins ljós og nú hevur felagið fingið navnið Hvistan**

HEILSA
*Dagfinn Olsen*
*sosialurin.fo*

Í oktober varð renni- og gongufelag sett á stovn í Suðuroynni. Tað gekk væl at fáa limir, men torførari var at finna eitt navn til felagið.

Nú hevur felagið fingið navnið Hvistan.

Í útvarpstímanum hjá Suðurrás í ÚF varð heitt á fólk um at koma við uppskotum og heitt varð eisini á ymisk fólk um at royna at finna felagnum eitt navn. Nevndin í felagnum valdi síðani úr rúgvuni og valið fall á Hvistan.

Navnið er úr eini søgu, har tað stendur; " Snoprikkur fór hvistandi niðan brekkuna...".

### Tiltøk

Felagið skipar í næstum fyri tiltøkum í næstum og 2. jóladag verður fyrsta tiltakið, ið fevnir um gangi- og rennitúr, ið øll kunnu taka lut í. Hetta verður klokkan 9.30 í Hovi og aftaná eru gløgg og holukøkur at fáa. Øll eru vælkomin og stigtakararnir vóna at síggja nógvar luttakarar.

Øll kunnu gerast limir í felagnum og um hálvthundrað eru longu í felagnum.

Í nevndini eru Karina Magnussen, form., Karin Strøm, skrivari, Turið Vestergaard, Bjørg Hofgaard og Randi Strøm.



*Tað er væl umtókt at renna sær ein túr og í Suðuroynni eru tað nógv, ið renna dagliga. Mangir vágbingar renna sær ein túr í náttúruvøkrum umstøðum kring Vatnið vesturi á Eiðinum í Vági, har henda myndin er tikin ein seinnapart í vikuni*

(mynd: D. Olsen)

# Seta meiri ferð á ætlanini at gera tunnil undir Skopunarfjørð

**Vinnunevndin hjá løgtinginum vil seta meiri ferð á arbeiðið at fyrireika Sandoyartunnilin, sum skal binda Streymoy og Sandoy saman**

SANDOYARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Um nøkur ár verður koyrandi av Streymoynni í Sandoynna.

Tað hava fleiri politikarar úr fleiri flokkum sagt.

Og politikarar úr øllum flokkum gera sítt til at halda lív í hesi ætlanini.

Tí hevur ein samd vinnunevnd hjá løgtinginum mælt til, at meiri ferð verður sett á arbeiðið at fyrireika arbeiðið at gera undirsjóvartunnil ímillum Streymoynna og Sandoynna.

Vinnunenevndin hevur sostatt samtykt at heita á fíggjarnevndina og Løgtingið um at seta meiri pening av til tær forkanningar, sum skulu gerast.

Upprunaliga bað landsverk um at fáa fimm milliónir næsta ár til at gera forkanningar fyri í sambandi við komandi undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy.

Vinnumálaráðið hevur upplýst, at Landsverk metti, tað var ein hóskandi upphædd, so at fyrsti partur av kanningunum kann fáast frá hondini.

Sjálvar kanningarnar skulu gerast á sumri, meðan útgreiningarnar kunnu gerast um veturin.

Men nú er fíggjarlógin fyri 2006 til viðgerðar og í tí sambandinum mælir vinnunevndin hjá Løgtinginum til at geva Landsverki tær fimm milliónirnar hann bað um, so at fyrsti partur av kanningunum kann gerast liðugur næst ár.

Tá ið sagt verður fyrsti partur av forkanningunum, er tað tí, at mett verður, at tað verður neyðugt við nøkrum fleiri kanningum afturat í 2007.



*Nú skal meiri ferð setast á arbeiðið at gera forkanningar í sambandi við undirsjóvartunnil undir Skopunarfjørð. Tað ætlar vinnunevndin hjá løgtinginum og tí vil ein samd nevnd hækka játtanina til endamálið*

Men í øllum førum fara tær fimm milliónirnar at røkka rættiliga langt í sambandi við at gera forkanningarnar lidnar.

Sostat mælir Vinnunevndin til at Landsverk fær ikki fýra milliónir, sum landsstýrið hevur ætlað, men fimm milliónir til at gera forkanningar fyri í sambandi við fast samband um Skopunarfjørð.

Tað er ein samd vinnunevnd sum stendur aftanfyri tilmælið og tí eru vónirnar til at tað verður fylgt, rættiliga góðar.

# Halda lív í tankanum um at gera tunnil til Dals

**Næsta ár skal spónur setast í arbeiðið at fyrireika tunnil ímillum Húsavík og Dal í Sandoy**

DALSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at vegurin ímillum Húsavík og Dal er ikki fyri ræðuskítar at koyra eftir, í hvussu so er ikki um veturin í kava og ísi.

Vegurin er høgdur inn í bergið. Hann er smalur og tað er høgt niðurfyri og tað loypur ofta oman á hann

Í nógv ár hevur tí verið tosað um at tað er neyðugt at gera tunnil ímillum Húsavík og Dal.

Higartil er tað kortini ikki blivið til stórt meiri enn tos!

Men næsta ár skal spónurin setast í.

Tað ætlar vinnunevndin hjá løgtinginum í øllum førum.

Nú fíggjarlógin fyri 2006 er til viðgerðar, hevur vinnunevndin sotatt mælt fíggjarnevndini og løgtinginum til at seta pening av til at fyrireika arbeiðið at gera tunnilin.



*Tað hevur í nógv ár verið tosað um at gera tunnil ímillum Húsavík og Dal. Men nú skal tað eisini henda nakað ítøkiligt*

Í ár var eisini ein millión sett av til endamálið, men næsta ár ætlaði landsstýrið ikki, at ein króna skuldi brúkast til Dalstunnilin.

Men nú skjýtur vinnunevndin hjá løgtinfinum upp, at ein millión krónur verða settar av á fíggjarlógini næsta ár til at fyrireika arbeiðið at gera ein Dalstunnil, so at arbeiðið kann halda fram.

Tað er nú, fíggjarlógin fyri næsta ár er til viðgerðar, at vinnunevndin mælir til, at peningur eisini verður settur av til arbeiðið at fyrireika Dalstunnilin.

Tað er ein samd vinnunevnd, sum stendur aftanfyri tilmælið og formaðurin í nevndini. Hendrik Old, hevur tí rættiliga góðar vónir um, at tað verður fylgt.

Henrik Old sigur, at nakrar royndarboringar eru gjørdar, men at hetta er ein roynd at seta eina upphædd av til rendamálið, sum eitt sindur av arbeiðið kann gerast fyri.

– Hetta er eisini fyri at vísa dalbingum og sandoyingum, at tað er gongd í málinum, leggur hann afturat.

Tað er ikki avgjørt, hvat peningurin skal brúkast til, men hann kann brúkast til vegagerðina í sambandi við tunnilin, ella til okkurt annað endamál, sum mett verður at tað er mest skilagott at brúka peningin til.

Hinvegin er samja ikki gjørd um, nær farið verður undir sjálvan tunnilin.

### 400-1050 metrar

Annars hevur Vinnumálaráðið upplýst fyri vinnunevndini, at enn er ikki greitt, hvussu vegirnir í sambandi við tunnilin verða lagdir, men arbeitt verður við tí.

Fyribils verður mett, at vegaføringin fer at vera einar 100 - 450 metrar Húsavíkarmegin og 300 - 600 metrar Dalsmegin, so tilsamans skulu ímillum 400 og 1050 metrar av vegi gerast í sambandi við tunnilin.

Verður vegagerðin gjørd so, at grót ikki fæst frá tunnilsgerðini, verður prísurin á vegnum einar 12.000 krónur fyri meturin. Men verður grótið tikið úr tunlinum, verður vegurin eitt sindur bíligari, tí so fer hann at kosta einar 10.000 krónur fyri meturin.

Sostatt sigur ein fyribils meting, at sjálvur vegurin í sambandi við tunnilin fer at kosta ímillum 4,8 milliónir krónur og 12,6 milliónir.